STARV
Sosialurin

# Sosialinum tørvar blaðfólk

Sosialurin fer í næstum at víðka um virkisøkið, har dentur verður lagdur á at skriva tíðindi til internetið. Ein alsamt vaksandi partur av tíðindaflutninginum fer um internetið, og fara vit nú at veita lesarum okkara eina enn betri tænastu á hesum øki við at dagføra tíðindini á internetinum allan dagin.

Uttan dugnalig starvsfólk ber ikki til at menna fyritøkuna, og tí hava vit brúk fyri at økja um redaktiónina sum skjótast, soleiðis at orka verður til at taka sær av tíðindunum á internetinum.

Vit bjóða tær eitt hendingarríkt og fjølbroytt starv, har tú verður partur av eini vælvirkandi og livandi redaktión, og tú sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving ella journalistiskum royndum hava fyrimun. Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, og at tú fylgir væl við í tí, sum hendir og rørist í samfelagnum.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan leygardagin 1. desember 2001:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra, á telefon 216409

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.

Sosialurin -har tað hendir

mbf

# MBF søkir dagligan leiðara

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum (MBF) søkir dagligan leiðara at seta frá 1. jan. 2002 ella eftir nærrri avtalu.

**Vit bjóða:**
- eitt fulltíðarstarv ella 3/4 tíð - um ynskist. Fyrsta árið er royndarár.
- eitt áhugavert, mennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum, ið m. a. fevnir um samskifti við limafeløgini, almennar myndugleikar og luttøku í norðurlendskum samstarvi,
- løn sambært galdandi sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta, at tú**
- hevur áhuga og kunnleika fyri arbeiðinum innan brekaðøkið
- hevur útbúgving sum sosialráðgevi ella líknandi
- hevur kunnleika til lógarverkið, ið er galdandi fyri hetta økið.
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur kunnleika til umsitingarligt arbeiði og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum og hevur góðan telduførleika.

MBF er meginfelag fyri 22 ymisk feløg. Starvsnevndin setir og loysir dagliga leiðaran úr starvið, og leiðarin arbeiðir undir leiðslu nevndarinna.

Umsókn við relevantum skjølum verður at senda til MBF, Íslandsvegur 10c, 100 Tórshavn, merkt **Umsókn, innan 17. des. 2001.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til MBF-skrivstovuna, tlf. 317373 ella á e-mail: mbf@post.olivant.fo

# Leiðandi starv

Í samband við víðkan og nýmótansgerð av goymslu okkara søkja vit eftir fólki til at leiða móttøku av vøru, logistering av goymslu, ordraavlegging og at røkja lagurstýringsskipanina.

Viðkomandi skal hava royndir innan arbeiðsleiðslu, hava kunnleika til EDV, vera samstarvsfúsur og málsøkin. Arbeiðstíðin kann vera skiftandi.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn verður at senda til P/F Poul Michelsen, Postbox 200, FO 110 Tórshavn.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til okkara og tosa við Christian Danielsen, fíggjarleiðara, á tlf. 314650.

**P/F Poul Michelsen**

# Tiltøk í des. 2001

MÁLNINGAFRAMSÝNINGIN HJÁ INGE JENSEN, NOREG, ER Í HÚSINUM ITL OG VIÐ 14: DESEMBER 2001

**Leygardagur 01. kl. 16.00**
Íslendskur mentanardagur. Á skránni verður m.a.: Tórshavnar Manskór syngur íslendsk løg, Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð spælir klassisk klaverstykkir, Úlfur Hjørvar greiðir frá um fullveldistilgongdina í Íslandi fyrst í nýtjanhundraðtalinum, umframt at myndir og bøkur um hetta tíðarskeiðið verða sýndar fram

**Sunnudagur 02. kl. 16-18.30**
Almennur fyrilestur: Viðgerðarstovnurin Heilbrigdið 15 ár. Luttakarar úr Føroyum, Íslandi og Danmark luttaka. Áftaná verður fundur

**Fríggjadagur 07. kl. 08.00**
Føroya Tele skipar fyri starvsfólkadegi

**Fríggjadagur 07. kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur við Dansifelagnum í Havn

**Leygardagur 08. kl. 14.00**
Framløga av bók, sum Hans Jacob Debes hevur skrivað um Føroyar. Bókin er skrivað á donskum

**Sunnudagur 09. kl. 16.00**
Konsert »Gloymska í Grape«. Unn paturson, sang, Malan Eyðunsdóttir & Anna maria Petersen, kór, Rógvi á Rógvi & Brandur Jacobsen, trummur/slagverk, Bjarki Meitil, bass/slagverk, Herluf Lutzen, guitar & kór og Finnur Hansen, keyboard & kór.
Unn Paturson og Ári Patursson hava skrivað orðini.
Unn Paturson og Rógvi á Rógvi hava skrivað tónleikin.

**Hósdagur 13. kl. 19.00**
Luciudagur

**Hósdagur 13. kl. 20.00**
Konsert við Eivør Pálsdóttir **í Gøtu Kirkju**

**Fríggjadagur 28. kl. 10.00**
Skipara- og Navigatørfelagið heldur fund

**Fríggjadagur 28. kl. 10.00**
Føroyskir Fiskimenn uttanlands halda fund

**Norðurlandahúsið er stongt frá leygardegnum 15. desember til og við nýggjársdag 1. januar 2002, tó undantikið fríggjadagin 28. desember, tá húsið er opið kl. 10.00-18.00**

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***
***Kaffistovan er opin, tá ið húsið er opið.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

www.sosialurin.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

Frá kommunalu brennistøðini á Sandvíkarhjalla. Bláu posarnir til vandamikið burturkast verða heintaðir í komandi viku.

**Kommunala brennistøðin**
**í**
**Tórshavnar kommunu**

# Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 22. november 2001, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, hevur góðkent:

**Kassavirkið hjá Sp/f Coma-Pack í Froðba**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2 hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýria vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

# Elektrikari

Til el-innleggjaravirki okkara á Eiði søkja vit eftir elektrikara at byrja skjótast gjørligt.

Tú skal saman við starvsfeløgum arbeiða við bæði størri og smærri projektum, sum fevna um vanligar og serligar el-innleggingar. Løn sambært avtalu.

Meira fæst at vita við at venda sær til Petur F. Joensen fart. 210388.

**PFJ-EL**
**FO-470 Eiði tlf. 423388**

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

**PF. VALDEMAR LÜTZEN**
**Skálatrøð - 311020**




**Tilboð til tann kræsna fríggjadagin og leygardagin lata vit 10% av øllum Metabo maskinum**

http://www.sosialurin.fo
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lýsið við brúktum bilum
Sosialurin
www.sosialurin.fo




**pf Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg